TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Leiðari til útibarnagarð

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir leiðara til útibarnagarðin við Havnará "Glóðina" at byrja 1. januar ella eftir avtalu.

Stovnslýsing
Í "Glóðini" búleikast 20 børn í aldrinum 5 til 7 ár.

Vit bjóða
- eitt áhugavert starv í einum fjølháttaðum grannalagi, sum hevur stóran týdning í dagliga arbeiðinum.
- møguleika fyri at seta tín dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving

Vit ynskja
- at tú ert útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir (er fyrimunur)
- kann arbeiða sjálvstøðugt, og kunna taka avgerðir
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemið í einum útibarnagarði
- at tú saman við starvsfólkunum er við til at menna ta pedagogiska arbeiðið
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tær dámar at vera úti saman við børnunum

Meira fæst at vita
við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara, ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra, tlf. 31 51 60.

Setanarviðurskifti
Samþært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Umsókn
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 3. desember 2001.

SNARSKIVAN

TK Stovan

KUNNINGARFUNDUR UM VIRKSEMIÐ HJÁ TK STOVUNI

Mikukvøldið 21. nov. kl. 19.00 til uml. kl. 21.00 á Runavíkar Sjómansheimi

Skrá

1. Alment um TK Stovuna
   - hvat kann TK Stovan bjóða vinnuni, ídnaðarfólki, uppfinnarum o.ø.
   - kann TK Stovan hjálpa tær?
2. Ognarviðurskifti og ábyrgdir við ymiskum virkisformum: Firma, P/f og Sp/f - fyri ídnaðarfólk og uppfinnarar
3. Hvussu kann eg meta mítt virki og samanbera tað við onnur virkir (Benchmarking)
4. Umboð frá lokalu deildini hjá Toll og Skatt greiða frá, hvørji rættindi og hvørjar skyldur virkir hava yvirfyri skattamyndugleikunum
5. Ymiskt
   - møguleiki er at seta viðkomandi spurningar

Ynskiligt er, at boðað verður frá luttøku á tlf. 31 73 66

TK Stovan heldur kunningarfund seinni á hesum støðum:
í Vági, í Miðvági, á Sandi og í Klaksvík

Nærri um tíð og stað verður lýst seinni.

Um onnur pláss ynskja kunningarfund, kann umboð venda sær til TK Stovuna og avtala nærri.

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
Tel. +298 317366, Fax +298 319363
tk@tk.fo www.tk.fo

VIL IVITANVØKSTUR

FÚTASTOVA

KONGABRÚGVIN TLF. 322175

Gávuna til hann/hennara sum eigur alt

Vit hava opið: mánadag-fríggjadag 11-17.00
leygardag 10-14.00

Skrivstovuhølir til leigu

Í bygningi okkara á Argjum hava vit 150 m² skrivstovuhølir til leigu frá 01. jan. 2002.

Hølini eru ljós og rúmlig við sera góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, edv- & telenet er í hvørjum rúmi. Hølini hava egna inngongd og atgongd til køk. Vitja heimasíðu okkara www.eltele.fo fyri at síggja hølini. Áhugað kunnu ringja ella koma inn á gólvið mán.-frí 8.00-17.00.

el & tele

Tel. 354 354

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Prekvalifisering
El-arbeiði í Vágatunnlinum

Áhugaðir arbeiðstakarar verða við hesum bodnir at vísa áhuga at vera við í avmarkaðari útbjóðing av el-arbeiði í Vágatunnlinum.

Prekvalifikatiónstilfarið fæst við at venda sær til skrivstovu okkara á adressuni niðanfyri, ella við at senda teldupost til drh@vagatunnilin.fo

Freistin at lata inn umbidnu upplýsingarnar er 6. december 2001.

VÁGATUNNILIN
Vágatunnilin p/f · Skansavegur 7 · Postboks 1010
110 Tórshavn · Telefon 350200 · Telefax 350201

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli

Maritim fyrireiking

Um nóg nógv tekna seg, byrjar nýtt skeið í maritimari fyrireiking mánadagin 7. januar 2002 og endar við próvtøku í mai/juni 2002.

Undirvísingin verður á Føroya Sjómansskúla.

Lokið prógv gevur atgongd til víðari lestur á maskinmeistaraskúla og navigatiónsskúla. Til ber at søkja útbúgvingarstuðul.

Tilmelding:
Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli
Frúutrøð 1 • postboks 353 • 110 Tórshavn
Tlf. 317755 • Telefax 318250

Norðoya Javnaðarfelag

Mánakvøldið 19. november og valdagin 20. november verður opið hús í Bøgøtu 3.

Tey, ið ynskja bil á valstaðið, kunnu ringja á tlf. 261232, 261236, 215054 og 222655

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2769, Sp/f JHR-Entreprenørar, 600 Saltangará.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Jón Kári Højgaard, 640 Rituvík.
Innkomin í nevndina: Johannes Johannesen, 640 Rituvík.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Jón Kári Højgaard, 640 Rituvík.
Innkomin sum stjóri: Johannes Johannesen, 640 Rituvík.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f Eysturoyar Bókhaldsstova, 600 Saltangará.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 15. november 2001

Kristin Balle

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Sosialurin - 311820

Rætti bilurin til mong endamál.
Pláss fyri 7 fólkum
og hópin av viðføri.

D. B. Bilar
Tel. 310 600

Lesið Sosialin

www.sosialurin.fo

Mentamálastýrið
Vinnu- og Miðnámsskúladeildin

Undirvísingarleiðari

(Sjómansskúlarnir og Maskinmeistaraskúlin)

Starvið
Nú undirvísingarleiðari okkara er farin úr starvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum undirvísingarleiðari leyst at søkja í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini.

Høvuðsuppgávurnar hjá undirvísingarleiðaranum verða m.a. at:
- Leggja til rættis og menna útbúgvingarnar serliga innan tað maritima økið
- Ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- Málsviðgerð
- Luttaka í verkætlanum t.d. innan dygdarmenning, bæði á stovnum undir stýrinum og innanhýsis. Harumframt kunnu nevnast útbúgvingar til eina møguliga framtíðar oljuvinnu
- Samskipa virksemið við tilknýti til økið við aðrar deildir, stovnar og áhugafelagsskapir
- Fremja samstarv við vinnulívið o.o., ið varða av økinum

Undirvísingarleiðarin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvar við nútímans krøv.

Førleikakrøv
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjarnir hava
- Viðkomandi hægri útbúgving
- Áhuga fyri at arbeiða við dygdarmenning (kvalitetssikring). Kunnleiki til hetta øki gevur fyrimun
- Góð samstarvsevni og hug at arbeiða í bólkum
- Førleika at menna samstarvið við vinnulívið og áhugafelagsskapir
- Áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

Vit bjóða
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og útettir.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett samþært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

Umsókn
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálastýrið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. desember 2001.

Starvið verður sett skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Eyðgunn Samuelsen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Øki hjá Vinnu- og Miðnámsskúladeildini** umfatar studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlan, sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlan og lærlingaútbúgvingar.*

Skeið í Doculive/scanning

27. Novembur

formula.fo
Skeið- og menningardeildin Tel.: +298 311116 · www.formula.fo

Keypssamtøkan í Hoyvík

Søkt verður eftir fólki, til at røkja frukt- og grønmetisdeildina í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja beinanvegin, ella skjótast tilber.

Tann, ið settur verður, má vera røkin og álítandi. Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um viðkomandi hevur royndir innan økið.

Talan er um fulltíðarstarv. Løn sambært sáttmála við S&K.

Meira fæst at vita um starvið hjá Bent Lundsgaard, tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til FK Hoyvík, Box 349, 188 Hoyvík.

Keypssamtøkan í Hoyvík